Nr. 80/2019

Sirið Stenberg
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um flyting av Barnadeildini á Landssjúkrahúsinum, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvat heldur landsstýrismaðurin um, at børnini missa Barnadeildina og verða innløgd saman við vaksnum ?
2. Metir landsstýrismaðurin, at broytingin á pædiatriska økinum er til barnsins besta, og í samsvari við sáttmálan um barnarættindini ?
3. Eru starvsfólkini á Barnadeildini tikin við í avgerðina at flyta Barnadeildina ?
4. Hvørja ávirkan fer tað at hava á innleggingar hjá børnum, at Barnadeildin verður flutt ?
5. Hvat fer at mangla á deildini, har børnini vera flutt til, í mun til tær umstøður, sum eru á Barnadeildini ?
6. Hvørja ávirkan fer tað at hava á virksemið nú og komandi mánðirnar, at seingjatalið er minka so nógv ?
7. Kann tað roknast við, at Barnadeildin frameftir kann flytast og minkast t.d í feriutíð ?
8. Sjúkrarøktarfrøðingarnar á Barnadeildini hava frásagt sær fakliga ábyrgd av pædiatriini. Hvat merkir hetta í praksis og hvør hevur so ábyrgd ?

Viðmerkingar:
Tað hevur verið alment frammi, at Barnadeildin verður flutt inn á aðra deild, har vaksnir sjúklingar liggja, og at deildin minkar niður í tvær seingjastovur. Ætlanin er ásett at vara í fleiri mánaðir. Í roynd og veru merkir hetta, at vit onga Barnadeild hava.
Tað hevur verið hildið sera fast í, at børn og vaksin ikki eiga at vera innløgd saman, og at rætturin hjá børnum til serstakar deildir er eyðsýndur. Millum annað hetta var grundarlagið undir at gera serstaka barnapsykiatriska dagdeild. Barnaumboðsmaðurin átalaði eisini ónøktandi viðurskiftini tá. Tí kann tað undra stórliga, at hendan broyting nú verður framd.
Støðan við Koronu er serstøk og krevur nógv. Ongin ivi um tað. Men er tað rætt at ofra Barnadeildina, og er onki alternativ til ætlanina er viðkomandi at spyrja.
Vit vita øll, at virksemið í sjúkrahúsverkinum hevur verið sera nógv skert vegna Koronu. Nú virksemið letur uppaftur, eru uttan iva mangir bíðilistar at fáa avgreiddir. Spurningurin er tí eisini, hvussu bíðilistin hjá børnum kann minkast niður aftur, tá ið seingjaplássini eru so skerd.
Tað er upplýst, at sjúkrarøktarfrøðingar á Barnadeildini als ikki taka undir við ætlanini, og at sjúkrarøktarfrøðingar frásiga sær fakliga ábyrgd. Tí skapar verandi støða stóran ótryggleika.

Tað er ikki óhugsandi, at tørvur kann vera á at innleggja børn við Koronu. Tí er eisini neyðugt at fáa greiðu á hvat hendir, um so er, og eisini at fáa greiðu á, hvussu tann støðan ávirkar samlaðu tænasturnar til børnini.

Á Løgtingi, 7. mai 2020

Sirið Stenberg